## Sílaalararnir illa fyri

Norski útflutningurin av aldum sílum til ES er minkaður burtur í at kalla einki. Í januar útfluttu norðmenn 41 tons av sílum til ES-marknaðin. Í sama mánað í fjør var nøgdin 600 tons.

Í september í fjør legði ES 20 prosent revsitoll á ald norsk síl, og tað er høvuðsorsøkin til ta stóru minkingina í útflutninginum. Sambært blaðnum Aftenposten eru norsku alararnir ørkymlaðir, tí herfyri hótti ES eisini við tiltøkum ímóti norskum laksi. Formaðurin í alarafelagnum, Lisbeth Berg- Hansen, sigur við Aftenposten, at norska alivinnan hevur havt stórar trupulleikar at dragast við, og hon stúrir fyri, at fleiri alifeløg fara av knóranum.

Fleiri norskir alarar fýlast á, at myndugleikarnir í Oslo geva alivinnuni ov lítlan ans. Teir siga, at kreppan í vinnuni kann fáa álvarssamar avleiðingar fyri framtíðina, men at tað tykist, sum at politikararnir als ikki geva sær far um tað.

## Fangi doyði

Bretska verjumálaráðið er farið undir at kanna, hvat hendi, tá ein iraki doyði í einari bretskari fangalegu nærhendis Basra har suðuri í Irak.

Blaðið The Sun vil vera við, at ein bretskur hermaður er lagdur undir at hava sligið irakan so meint, at hann doyði av løstunum. Sambært blaðnum vórðu fleiri aðrir fangar illa viðfarnir, og seks teirra hava nú skuldsett bretsku hermenninar fyri harðskap og dráp.

Ein talskvinna hjá verjumálaráðnum í London váttar fyri The Sun, at myndugleikarnir kanna ein tilburð, har ein iraki doyði í einari fangalegu hjá bretska herinum í Basra. Talskvinnan sigur, at verður tað staðfest, at bretskir hermenn hava brotið lógina, fáa teir ta ásettu revsingina.

## Selja almennar fyritøkur

Norskir fjølmiðlar hava í seinastuni skrivað, at stjórnin umhugsar at selja partar av teimum báðum stóru almennu fyritøkunum Statoil og Telenor.

Tað almenna eigur 81,7 prosent av partabrævunum í Statoil, og Stórtingið hevur givið stjórnini tilsøgn um at selja burturav. Tó skal tað almenna ikki eiga minni enn tveir triðingar av felagnum. Tann almenni ognarparturin í Telenor er 63,6 prosent, og hevur Stórtingið samtykt, at tann almenni parturin skal ikki niður um 51 prosent. Sambært TV2 væntar stjórnin at fáa einar 27 milliardir krónur í ríkiskassan fyri ta ætlaðu søluna í teimum báðum feløgunum.

Statoil almannakunngjørdi í gjár úrslitið í 2003. Tað vísti 48,9 milliardir nmorskar krónur í avlopi fyri skatt, og tað var heili 13 prosent meiri enn í 2002. Nettoúrslitið var 16,6 milliardir krónur.

## Diana Ross í fongsul

Kenda amerikanska songkvinnan Diana Ross skal í fongsul fyri rúsdrekkakoyring.

Diana Ross bleiv tikin tann 30. desember í 2002, eftir at løgreglan hevði fingið boð um, at hon koyrdi í skeivari vegbreyt. Tá løgreglan tók hana, vísti tað, seg, at hon hevði drukkið í meira lagi. Blóðroyndin vísti, at hon hevði 2,0 promillu av alkoholi í blóðinum. Mest loyvda markið í USA í sambandi við bilkoyring er 0,8 promillu.

Diana Ross var ikki hjástødd, tá rætturin í Tucson í statinum Arizona feldi dómin, men sambært einum blaði í býnum hevði hon játtað segseka. Umfram fongsulsrevsingina skal hon gjalda 6.000 krónur í bót, og hon skal eisini taka lut í einum avvenjingarskeiði.

Diana Ross gjørdist kend í sekstiárunum sum soulsangari og limur í bólkinum The Supremes.

UTTAN ÚR HEIMI

# Nú er John Kerry ein veruligur avbjóðari



*John Kerry fær eisini dygga undirtøku í Suðurstatunum, har republikanararnir vanliga eru teir sterku*

**Gjáranáttina vann John Kerry tey fyrstu uppstillingarvalini í Suðurstatunum, og nú verður hann mettur sum ein rættiligur avbjóðari hjá Bush, forseta**

UPPSTILLING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Senatorurin úr Massachusetts kann nú av álvara fyrireika seg til forsetavalið í heyst.

Gjáranáttina vann John Kerry uppstillingarvalini í statunum Virginia og Tennessee, sjálvt um tvey av hinum valevnunum, John Edwards og Wesley Clarke, vóru á heimavølli her. Í Virginia fekk Kerry heili 52 prosent av atkvøðunum, meðan sigurin í Tennessee var ikki so greiður.

Eygleiðarar í Washington siga, at tað kom óvart á, at Kerry fekk so dygga undirtøku í teimum báðum suðurstatunum. Teir tulka sigurin sum eitt tekin um, at Kerry er førur fyri at bjóða Bush, forseta av í Suðurstatunum, har republikanararnir vanliga eru teir sterkastu.

Sjálvur segði Kerry aftan á valsigurin gjáranáttina, at sigurin er eit tekin um, at amerikonsku veljararnir bæði í norði, eystri, vestri og suðuri vilja hava eina broyting.

Hann hevur nú vunnið 12 av 14 uppstillingarvalum. Í Virginina og Tennessee fekk John Edwards næstflestar atkvøður, og hann hevur gjørt av at halda fram í valstríðnum. Fyrrverandi NATO-generalurin Wesley Clark kunngjørdi í gjár, at hann gevst við royndini at gerast forsetavalevni.

# Mel Gibson lagdur undir jødahatur

**Mel Gibson hevur gjørt ein film um teir seinastu tímarnar hjá Jesusi. Jødiskir leiðarar vilja vera við, at filmurin osar av jødahatri**

FILMSLIST
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Um fjúrtan dagar verður nýggi filmurin hjá Mel Gibson »The Passion« frumsýndur í USA. Filmurin snýr seg um tólv teir seinastu tímarnar hjá Jesusi.

Higartil hava bara innboðin sæð filmin, teirra millum Marvin Hier, sum starvast á Simon Wiesenthal-stovninum. Við sjónvarpið CNN sigur hann, at filmurin gevur eina sera einsháttaða og dapra mynd av jødunum. Teir eru sleiskir, óndir og svíkjarar. Marvin Hier sigur við CNN, at soleiðis sum hann skilir filmin, fáa jødarnir skyldina av, at Jesus varð krossfestur.

Formaðurin í katólsku samgonguni, Bill Donahue, hevur eina heilt aðra uppfatan av filminum. Hann heldur als ikki, at filmurin ber bráð av hatri ímóti jødum.

Onnur, sum hava sæð nýggja filmin hjá Mel Gibson, siga hann vera sterkan og sera hugtakandi.



*Mel Gibson hevur gjørt nýggjan film um seinastu tímarnar hjá Jesusi*



# Eldrafelagið Nón vísti nýggju hølini fram

**Síðsta fríggjadag bjóðaði Eldrafelagið Nón almenninginum at síggja húsini, sum felagið hevur keypt í Torvgøtu 2 í Saltangará. Hetta eru eini rættiliga stór sethús í trimum hæddum, sum felagið hevur keypt fyri 1,3 miljónir krónur**

FELAGSLÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Seinasta fríggjadag vísti Eldrafelagið Nón húsini, sum felagið hevur keypt í Torvgøtu 2 í Saltangará, fram fyri almenninginum*

*Mynd: Maria Olsen*

Eldrafelagið Nón hevur húsast í hølunum hjá arbeiðarafelagnum, Hæddini í Saltangará, men nú hildu limirnir í felagnum, at tíðin var komin at útvega sær síni egnu høli.

Enn gongur tó ein tíð, áðrenn klárt er at flyta alt virksemið niðan í Torvgøtu, tí ætlanin er, at ein stórur salur skal gerast í kjallarahæddini. Hetta arbeiði er so smátt farið í gongd.

Felagið er væl stuðlað í sambandi við keypið. Runavíkar kommuna hevur verið ógvuliga beinasom, og tað hava ymiskar vinnufyritøkur eisini verið.

Tá ið húsini vórðu víst fram, fekk felagið eisini gávur.

Amy Djurhuus, formaður í Nón, sigur, at væl av fólki nýttu høvi at ynskja felagnum tillukku við húsunum.

- Fólk vóru ógvuliga positiv, hugtikin og glað okkara vegna, sigur hon.

### Fleiri limir

Formaðurin í Nón sigur, at limatalið í felagnum veksur alsamt. Fyri tveimum árum síðan hevði felagið bara 50 limir, men nú er limatalið 153.

Hon heldur, at ein orsøkin til vøksturin er, at felagið seinastu árini hevur verið rættiliga aktivt við nógvum ymiskum tiltøkum.

– Vit hava skipað fyri regluligum bingo, fyrilestrum, vit hava verið uttanlands, og vit hava eisini havt útlendskar gestir her heima, sigur hon.

Amy Djurhuus sigur, at ætlanin er at hava pottasláing í kjallaranum í Torvgøtu føstulávints mánadag.

– Nú royna vit í fyrsta lagi at gera húsini klár, og tá ið hetta arbeiði er liðugt, verða umstøðurnar tær bestu til ymisku aktivitetirnar hjá felagnum, sigur hon at enda.

# Listarligt »brak« á Varmakeldu

**Á komandi Varmakeldustevnu í Fuglafirði í juli er ætlanin at gera rættiliga nógv burtur úr, at tað í ár eru 35 ár liðin, síðan stig fyrstu ferð vórðu tikin til at hava málningaframsýning á stevnuni**

LIST OG TÓNLEIKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tey, ið dáma málningalist og tónleik, verða eftir øllum at døma ikki fyri vanbýti á komandi varmakeldustevnu, tá ið listaframsýningin, sum í fleiri ár hevur verið í fimleikarhøll skúlans, hevur 35 ár á baki*

Enn er ikki alt lagt í fastar karmar, sum verður á stevnuni, men greitt er, at stórur dentur fer at verða lagdur á málningalist og tónleik.

Ætlanin hjá stigtakarunum er bæði at nýta Ribarhús, fimleikarhøll skúlans og tveir aðrar bygningar, sum verða leigaðir til endamálið. Síðan er ætlanin, at tiltakið endar við einum stórum haldi í Mentanarhúsinum, har fólkadansur og ymisk onnur tiltøk verða á skránni.

Stigtakararnir ætla eisini at hava uttanduratiltøk við eitt nú tónleiki og sangi.

Málningaframsýningarnar, sum áður hava verið á Varmakeldu, hava í mong ár verið í fimleikarhøll skúlans.

### Breið luttøka

Av kendum listafólkum, sum fara at sýna fram á Varmakeldu, eru Frits Johannesen, sum hevur verið við øll 35 árini, Øssur Mohr, sum hevur verið við í eini 10 ár og Heðin Kambsdal. Guðrið Poulsen kemur úr Havn, og ætlandi koma eisini onkur norðurlendsk listafólk higar til lands við sínum listaverkum.

Sum nevnt, er alt ikki lagt í fastar karmar enn, men øll útlit eru kortini til, at tey, ið dáma málningalist og tónleik, verða ikki fyri vanbýti á komandi Varmakeldustevnu.

# Amy heldur fram sum formaður

**- Vit hava tikið eitt stórt tak við húsakeypinum, og eg eri ógvuliga fegin um, at limirnir hava tikið so væl undir við hesum, sigur Amy Djurhuus, formaður í Eldrafelagnum Nón**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týskvøldið hevði Eldrafelagið Nón á eystara armi á Skálafjørðinum aðalfund. Tríggir av nevndarlimunum stóðu fyri vali, Amy Djurhuus, formaður og nevndarlimirnir, Havgrímur Nielsen og Sólrun Jensdóttir.

Sitandi formaður seinastu tvey árini, Amy, fekk fullan stuðul til framhald. 32 fólk vóru á fundi. Tá ið atkvøðugreiðslan hevði verið, var greitt, at Amy hevði fingið 28 atkvøður, meðan fýra atkvøður vóru ógildugar. Sostatt fekk sitandi formaðurin fullan stuðul á aðalfundinum.

Nýggja nevndin í Nón sær nú soleiðis út: Amy Djurhuus, formaður, Poula Andersen, næstformaður, Hanna Nielsen, kassameistari, Maria Olsen, skrivari, Malvinus Reyná, Lenni Højgaard og Jóhanna Reyná. Tiltakslimir eru Ansa Højgaard og Ingun Olsen.

Nýggj í nevndini eru Jóhanna Reyná og Hanna Nielsen.

### Ógvuliga glað

Amy er ógvuliga fegin um stuðulin, hon fekk á aðalfundinum.

– Vit hava tikið eitt stórt tak við húsakeypinum, og eg eri ógvuliga fegin um, at limirnir hava tikið so væl undir við hesum.

Amy Djurhuus sigur, at hon tekur úrslitið á aðalfundinum sum eina stóra álitisváttan.

– Eg eri sera fegin um, at fólk eru so positiv, nú vit, sum flestu eru farin um tey seksti og sjeyti, hava tikið eitt so stórt tak, sigur hon.

Ein av yngstu limunum í Eldrafelagnum Nón, er Kári P. Højgaard, sum sjálvur ynskti at gerast limur í felagnum.